Mikladals kommuna

Bygdirnar Mikladalur og Trøllanes

Støddi: 14,23 kvm.
Markatal: 40
Íbúgvar: 73
Húski: 23

Íbúgvaratalið síðani 1973 (1.1.)

1973	68
1974	71
1975	71
1976	70
1977	71
1978	71
1979	72
1980	75
1981	72
1982	69
1983	68
1984	74
1985	73

Bygdarráðið:

Hjalmar Johannesen, form.
Jógvan Joensen
Ísak Petersen
Dánial Eliassen
Markus Hansen





Bygdamyndin. Mikladalur í dag

teir nevna Knúksdalur. Har verður so eisini umhugsað at gera ein bátahyl fyri alla oynna.

Tá ferjulegan kemur, tá verður uppaftur liviligari í oynni. Tí tá ber til at fara til arbeiðis í Klaksvík á morgni og koma heimaftur í oynna um kvøldið.

Best um øll oyggin var ein kommuna

Hjalmar Johannesen dylur ikki yvir, at tað hevði verið best fyri allar bygdirnar og fólkið í oynni, um alt var ein kommuna. Í dag eru har tvær kommunu. — Vit eru bert 100 til 150 fólk og sum ein kommuna høvdu vit staðið nógv sterkari enn sum tvær, leggur Hjalmar aftrat. Hann vónar tí, at kommunurnar í kalsoynni verða lagdar saman innan alt ov leingi.

Jarðarbrúk

Við undantaki av veg- og bergholsarbeiðinum er bert nakað av jarðarbrúki í Mikladals kommunu. Her eru tó stórir møguleikar at fáa meira burtur úr jørðini, soleiðis at mjólkin kann gerast ein munandi søluvøra. Í dag er mjólk einasta útflutningsvøra hjá Trøllanesi og Mikladali. Á Trøllanesi eru nakrir bóndur og hava teir tilsamans eini 20 neyt. Hjalmar Johannesen heldur, at góðir møguleikar eru at velta nógv úr nýggjum har og vísir hann til úttalilsi hjá Jógvan Joensen, bónda á Trøllanesi, at bøurin kann trifaldast, um velt verður úr nýggjum. Nú samband er millum bygdirnar, ber til at koma at jørðini við maskinamboðum og hetta gevur heilt nýggjar møguleikar fyri jarðarbrúki í oynni.

Eisini í Mikladali kunnu stórar viddir veltast úr nýggjum, men her er rættiliga nógv av uttanbiggjajørð, sum ikki kemur teimum, sum vilja gera nakað veruligt burtur úr jarðarbrúkinum, til góðar. Hjalmar Johannesen metir tó ikki støðuna har so vánaliga sum hana í Mykinesi. Onkur av bóndunum í Mikladali, sum ikki hevur nógv stráfóður sjálvur, hevur so sligið ein stóran part av bøi hjá øðrum, sum eiga jørð, men sum ikki sláa bøin sjálvi.

Snípan hent

Í Mikladali eru nøkur mjólkineyt. Tey flyta so mjólkina við Barskor, meðan Trøllanesfólk hava flutt ta nógvu mjólkina við Snípuni. Um summarið, tá Barskor kann koma at á Trøllanesi, fer mjólkin so tann vegin. Men Hjalmar heldur ikki, at hetta er nøkur framtíðar loysn. Lendingin er rættiliga illa farin í brimi tvær reisir, og nú verður hon helst ikki gjørd aftur. Hetta verður heldur ikki aktuelt, tá nýggj ferjulega verður gjørd aðrastaðni í oynni og samband er millum bygdirnar.

Men Snípan hevur verið sera hent, ikki minst hjá trøllanesfólki. Tey hava fingið mest sum alla vøru til og frá bygdini við Snípuni. Tað er annars mangan hent, at Trøllanes hevur ligið uttan samband við umheimin sjóvegis í heilsar tveir mánaðir. Hetta er so ein av orsøkunum til tær iløgur, sum í dag eru gjørdar í vegir og berghol í oynni.

Fleiri hús tóm

Hjalmar heldur sjálvur, at bygdirnar fara at mennast aftur, nú bergholini og vegirnir eru komin. Tað eru bert fá hús bygd í kommununi tey seinastu árini, og barnatalið er ikki tað stóra. Men nú eru so trý stykki við at verða stykkjað út í Mikladali. Hetta verður tó neyvan til fólk, sum koma at búgva har alt árið. Mong, sum eiga hús í Mikladali koma har um vikuskiftið ella bert um summarið. Í dag eru umleið 20-30 hús í Mikladali, tey seks av teimum standa tóm. Á Trøllanesi eru 4 hús.

Frítíðin

Hvat viðvíkir fritíðarvirkseminum í kommununi, so er tað rættiliga avmarkað. Mikladals Sóknar Fráhaldsfelag, sum leingi hevur verið eitt virkið felag, fylti 100 ár í fjør. Felagið eigur eini stór felagshús sum verða nýtt til fundir og samkomur av ymsum slag. Seinasta leygarkvøld var har bingo.

Annars plaga tey at spæla bólt í Mikladali. Har er eitt skapilsi av einum fótbóltsvølli og er ætlanin nú at umvæla henda vøllin. Ikki minst um summarið, tá nógv fólk er í oynni, kemur vøllurin væl við.

Um summartíðina kemur rættiliga nógv fólk í oynna. Tí hugsa menn eisini um at leggja ávis øki av til summargestirnar, sum koma við tjaldum og í framtíðini við campingvognum eisini, nú koyrandi verður í oynni.

Í dag eru eini 10 bilar í Kalsoynni.

Uttanbiggjajørðin

Hvat viðvíkir teirri nógvu uttanbiggjajørðini í eitt nú í mikladali, so heldur Hjalmar Johannesen, at hon átti at komið teimum, sum vilja arbeiða jørðina, til góðar. Hann heldur, at tað átti at verið bæði framleiðslu- og bústaðarskylda á jørð og tekur í hesum undir við mykinesfólki, sum hava sett ynski fram um hetta sama í Sosialinum.

Hjalmar hevur undirvísingina í kommununi um hendi. Hann skiftir millum Trøllanes og Mikladal aðruhvørja viku. Skúlin í Mikladali verður 100 ár í ár og heldur Hjalmar, at tað ein sera hugnaligur skúli. Skúlin Trølanesi er bygdur undir seinna kriggi.

Barnatalið í Mikladali er 3 og tað sama á Trøllanesi. Annars hevur Hjalmar kvøldskúlaundirvísing við einum flokki uppá 16 í Mikladali. — Hetta man vera elsti skúlaflokkur í heiminum, miðalaldurin er omanfyri 50 ár, so hann man fara at koma í Guinnes-árbókina, sigur Hjalmar skemtandi. Hann undirvísir í enskum, rokning, skriving og føroyskum.

Eitt minni um forsíðuna. Lendingin á Trøllanesi er mangan ótespilig og verður hon neyvan brúkt munandi aftur, nú ætlanin er at gera eina ferjulegu í oynni

Heldur tú ikki **sosialin***?*